vodafone **deildin**

**Ítróttafelag Fuglafjarðar**
**Postrúm 94**
**FO-530 Fuglafjørður**
**www.if.fo**

**STOVNAÐ**
**25. mars 1946**

**FORMAÐUR**
**Dan Petersen**

**MEISTARAR (1)**
**1979**

**STEYPAVINNARAR**
**ongantíð**

**GREIPUVINNARAR**
**ongantíð**

**Í BESTU DEILDINI**
**(25 ár)**
**1971-82, 1985, 1988-89, 1993-94, 1996-99, 2004-06, 2008-**

**Í EUROPA**
**ongantíð**

# Fuglfirðingar stíla hægri



**Við monnum sum Bartali Eliasen, Rógva Jacobsen, Høgna Zachariasen og Poul Ennigarð í hópinum tykist ÍF hava eina óhugnaliga styrki í loftrúminum**

**Mynd: Álvur Haraldsen**

## At fleiri markantir spælarar eru komnir aftrat ber við sær, at fuglfirðingar ætla sær meiri enn at stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting

Endatalvan fyri 2008 sigur, at ÍF endaði á sjeynda plássi. Kanska var tað ikki so galið út frá tí, sum tað frammanundan varð roknað við, og heilt víst var tað ikki nóg gott sammett við avrikini, sum fuglfirðingar av og á vístu á vøllinum.

ÍF avrikini vóru óstøðug. Viðhvørt hugflogsríkt og undirhaldandi álopsspæl, og aðrar ferðir uttan hugflog. Ivaleyst var tað ein bági, at tað fleiri ferðir var neyðugt at skifta venjara.

Nú er Jón Simonsen, sum upprunaliga skuldi hava ábyrgdina av liðnum í fjør, aftur við stýrisvølin, og hann og ÍF miðja høgt. At teir gera tað kemst av, at fleiri spælarar eru komnir til felagið, og at hesir hava verið roknaðir millum teir frægu. Høgni Madsen, sum í fjør stóð seg ógvuliga væl, fer nú at royna seg í Runavík. Hinir, sum eru farnir úr Fuglafirði, vóru ikki millum stuðulsspælararnar

Eingin ivi er um, at Hanus Eliasen og Høgni Zachariasen, sum eru komnir aftur úr Sundalagnum, fara at styrkja um liðið. Hvussu veteranurin Poul Ennigarð, sum hevur hildið frí frá fótbólti, fer at hilnast fer tíðin at vísa. Mest áhugaverda svarið verður, hvussu tað fer at verða við Rógva Jacobsen. Um hann verður væl fyri, so verður hann stórt og hvast álopsvápn. Um tað í spælkonseptinum verður roknað við Rógva, sum í vetur og í vár hevur verið nógv skaddur, so verður støðan ikki tann, sum tað verður roknað við og vónað.

Í heyst verða tað 30 ár, síðani ÍF fyri fyrstu og higartil einastu ferð vann FM heitið. Síðani hava fuglfirðingar fyri tað mesta staðið í skugganum av oyggjafeløgunum í Gøtu, á Toftum, í Runavík og viðhvørt eisini á Skála. ÍF hevur fyri tað mesta stíðst í botninum á bestu og í toppinum á næstbestu deildini, men nú tykjast fyritreytirnar at vera øðrvísi, og hópurin er so mikið breiður, at skaðar ikki fara at raka so meint, sum teir undanfarnu árini hava gjørt.

Spælararnir hava nógvar royndir, og tað átti at borga fyri, at avrikini verða støðugari, enn tey vóru í fjør: Andras Gango er fínur málverji, Bartal Eliasen kann bæði brúkast í miðverjuni og í álopinum – tá ið Rógvi Jacobsen ikki verður tøkur – Høgni Zachariasen, sum í fjør var nógv skaðaplágaður, verður lyklaspælari á miðvøllinum, og so eru tað so nógvir aðrir – bæði yngri og eldri – sum venja nógv og harvið geva venjaranum Jón Simonsen positivan trupulleika, sum teir ikki hava kent so nógv til í Fuglafirði.

### Hópurin hjá ÍF:

**MÁLVERJAR:**
**Andras Gango**

**VERJA:**
**Áki Petersen**
**Jan Ellingsgaard**
**Jonn Thomsen**
**Bartal Eliasen (Áður spælt við GÍ)**
**Fritleif í Lambanum**
**Viggo Johannesen (NSÍ)**
**Hans Pauli Petersen (GÍ)**
**Poul Ennigarð (GÍ)**
**Uni R. Petersen**

**MIÐVØLLUR:**
**Nenad Saric**
**Aleksandar Jovevic (TB, NSÍ)**
**Frank Poulsen**
**Dánjal á Lakjuni**
**Balazs Sinko**
**Ari Ó. Ellingsgaard**
**Høgni Zachariassen (EB/S)**
**Andy Olsen (NSÍ)**

**ÁLOP:**
**Rógvi Jacobsen (KÍ, HB, KR, SønderjyskE, Hødd)**
**Hanus Eliasen (EB/S)**
**Vincent Jacobsen**
**Atli Petersen**
**Hilmar Petersen**

**TILGONGD:**
**Rógvi Jacobsen (KÍ)**
**Hanus Eliasen (EB/S)**
**Viggo Johannesen (NSÍ)**
**Hans Pauli Petersen (Víkingur/ byrjaður aftur)**
**Poul Ennigarð (Víkingur/ byrjaður aftur)**
**Høgni Zachariassen (EB/S)**

**FRÁGONGD:**
**Rógvi Ryggshamar (Víkingur)**
**Knút Vesturtún (givin)**
**Tórstein Joensen (givin)**
**Høgni Madsen (NSÍ)**
**Debes Danielsen (B68)**
**Sasa Jovanovic (Serbia)**

**VENJARI:**
**Jón Simonsen**

**HJÁLPARVENJARI**
**Roy Róin**